

# Ung í Føroyum á 5. ári

**3. til 5. mars verður ungdómsmentanarstevnan Ung í Føroyum 2006 aftur í Norðurlandahúsinum. Freistin at tekna seg er 20. januar**

UNG Í FØROYUM

Tað er ikki á hvørjum degi, at stór mentanartiltøk kunnu halda 5 ára hald her í landinum. Men nú kann tað størsta afturvendandi mentanartiltakið fyri ung fegnast um at hátíðarhalda hetta.

Frá fríggjadagnum 3. mars til sunnukvøldið 5. mars fara listarliga virkin ung í aldrinum 13 til og við 18 ár úr øllum landinum at hittast í Norðurlandahúsinum. Tey fara at sýna fram egin verk, arbeiða í listaverksmiðjum og saman framleiða eina sýning til almeningin.

## Endamálið

Høvuðsendamálið hjá Ungum í Føroyum hevur frá 1. degi verið at at skapa eitt forum, har ljós verður varpað á ungdómsmentanina í Føroyum og har umstøður eru til tey ungu at sýna fram og menna tað listarliga virksemi, tey sjálvi eru áhugaði í. Tí vísa tey á stevnuni bæði egin verk, sum tey sjálvi hava framleitt undan stevnuni og tey framleiða eina sýning, har almenningurin fær høvið at síggja, hvat ungdómsmentan er, tá tey ungu sjálvi seta dagsskránna.

## 5 ára hald

Í samband við, at tað nú eru fimm ár síðani at Ung í Føroyum fór av bakkastokki – í februar 2001 – fara 70 útvald hesa ferð at sleppa við á stevnuna; vanliga sleppa bara 60 við. Tey fara at arbeiða í sjey ymsum listaverksmiðjum undir leiðslu av føroyskum yrkislistarfólkum. Verksmiðjurnar hesaferð verða: Tónleikur v/ Kára Sverrasyni og Hera Joensen, Sjónleikur v/ Mikkjali Helmsdal, Skriving v/ Marjun Kjælnes, Design v/ Svanhild Strøm, Foto v/ Inga Joensen, Dansur v/ Kristinu Sørensen og Rannvá Káradóttur og Filmslist v/ Siggu Vang og Gudmundi Nielsen.



*Í samband við, at tað nú eru fimm ár síðani at Ung í Føroyum fór av bakkastokki – í februar 2001 – fara 70 útvald hesa ferð at sleppa við á stevnuna; vanliga sleppa bara 60 við*

## Tiltakið víðkað

Síðsta ár varð tiltakið víðka frá at vera ein stevna, ið bert er annaðhvørt ár í Norðurlandahúsinum, til at vera eitt tiltak sum røkkur víðari um landið og er á hvørjum ári. Í februar 2005 var fyrsta sokallaða millumstevnan í Fuglafirði, kallað Ung í Føroyum Eystur 2005 og í september var onnur stevnan í Sørvági, Ung í Føroyum Vestur 2005.

Hesar báðar stevnurnar vóru nakað styttri enn tær í Norðurlandahúsinum, men ikki minni væleydnaðar. Støðið á tí, sum luttakararnir høvdu framleitt frammanundan at sýna fyri hvørjum øðrum, var høgt og tað, ið framleitt var á verksmiðjunum, gjørdi øll, bæði áskoðarar og fyriskiparar bilsnar av síni dygd og nøgd.

## Fyriskiparar

Fyriskiparar av hesum millumstevnum vóru kommunurnar í teimum báðum økjunum, nevniliga í eystri: Fuglafjarðar Kommuna, Klaksvíkar kommuna, Runavíkar kommuna og Leirvíkar kommuna og í vestri: Sørvágs kommuna, Miðvágs kommuna og Sandavágs kommuna, báðar ferðir í samstarvi við Norðurlandahúsið og Mentamálaráðið.

Fyriskipari fyri stevnuna í ár er í Norðurlandahúsið í samstarvið við Mentamálaráðið og tær áðurnevndu kommunurnar. Høvuðsstuðul er Føroya Banki.

Framyvir er ætlanin, at makað ár skal stevnan verða í Norðurlandahúsinum og støk ár skulu tríggjar styttri millumstevnur verða úti um landið.

Samskiparar fyri verkætlanini eru Hedvig Westerlund-Kapnas, Rakel Helmsdal og Kristianna Poulsen.

## Fá meira at vita:

Heimasíðan hjá Ungum í Føroyum www.ungiforoyum.info, sum nú hevur eitt ár á bakið, hevur rúgvusmikið tilfar um komandi stevnuna og annars tiltakið sum heild. Her ber til at lesa tíðindi, fyrilestur, alt um stevnurnar seinasta ári og síggja nógvar myndir frá nærum øllum stevnunum. Heimasíðan verður alsamt dagførd.

Her ber nú til at fáa nærri upplýsingar um verksmiðjurnar og verksmiðjuleiðararnar og eisini at taka niður tekningarskjalið, ið skal verða inni 20. januar



*Høvuðsendamálið hjá Ungum í Føroyum hevur frá 1. degi verið at at skapa eitt forum, har ljós verður varpað á ungdómsmentanina í Føroyum og har umstøður eru til tey ungu at sýna fram og menna tað listarliga virksemi, tey sjálvi eru áhugaði í*